## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og um middagsleitið regn. Seinnapartin andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um dagin millum 7 og 10 stig, men fellur um kvøldið niður í 1 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri og eitt skifti avfall, partvís kavi. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann veksur vindin til hvassan vind ella skrið av útsynningi og eitt skifti regn ella vátakavi. Seinni ælingur, partvís kavi. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og leygardagin yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin stundum regn. Hitin kemur upp í 4 til 8 stig.

# Mangt er millum himmal og jørð



*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í hesi vikuni letur ein framsýning við Bodil Kaalund upp í Norðurlandahúsinum. Bodil fer at sýna fram myndlist sína komandi mánaðin**

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Í dag mikudagin kl. 17 letur Norðurlandahúsið dyrnar upp fyri fólki, ið hava eru áhugað í myndlist. Tá verður høvi hjá fólki at skoða myndlistaframsýningina »Millum himmal og jørð« hjá Bodil Kaalund.

Bodil Kaalund er úr Danmark, og hon er málari, grafikari og rithøvundur. Útbúgvingina hevur hon frá Kunstakademiinum í Keypmannahavn, og hon hevur eisini gingið á øðrum skúlum fyri málarar.

Hon hevur ferðast nógv og arbeitt bæði í Norðurlondum og í Evropa, eins og hon hevur fingið stipendium og legat.

Bodil Kaalund hevur havt nógvar framsýningar bæði í Danmark og aðrastaðni, og hon hevur harafturat málað fleiri altartalvur.

Bodil er fødd í 1930 í Silkeborg, og framsýningin í Norðurlandahúsinum verður fram til 7. mars.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | ÷13 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 11 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 13 |
| Róm | – |
| Malorca | 17 |
| Athen | 11 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | ÷2 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1002 hPa. yvir Atlantshavinum á 50N-30V fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani fer um Føroyar mikudagin.




Lágtrýstið norðanfyri Føroyar fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/02 kl. 06[00]–13/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALL




Avfallið: 20,3 mm – mált frá 12/02 kl. 06[00]–13/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 72,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. feb. | 11:39 | — | 10:39 | 23:14 | 10:54 | 23:29 | 01:16 | 13:39 | 02:16 | 14:39 | 09:54 | 22:29 | 08:54 | 21:29 | 11:54 | — | 00:31 | 12:54 | 11:24 | 23:59 | 00:16 | 12:39 |
| 15. feb. | 00:14 | 12:49 | 11:49 | — | — | 12:04 | 02:14 | 14:49 | 03:14 | 15:49 | 11:04 | 23:39 | 10:04 | 22:39 | 00:29 | 13:04 | 01:29 | 14:04 | — | 12:34 | 01:14 | 13:49 |
| 16. feb. | 01:24 | 13:59 | 00:24 | 12:59 | 00:39 | 13:14 | 03:24 | 15:59 | 04:24 | 16:59 | — | 12:14 | 11:14 | 23:38 | 01:39 | 14:14 | 02:39 | 15:14 | 01:09 | 13:44 | 02:24 | 14:59 |
| 17. feb. | 02:23 | 14:48 | 01:23 | 13:48 | 01:38 | 14:03 | 04:23 | 16:48 | 05:23 | 17:48 | 00:38 | 13:03 | — | 12:03 | 02:38 | 15:03 | 03:38 | 16:03 | 02:08 | 14:33 | 03:23 | 15:48 |

7. febr.: Mánin næstur jørðini
8. febr.: Fullmáni
15. febr.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001